52-104/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 104/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um bót til alifyritøku fyri brot á djóravælferðarlógina

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Kann løgmaður upplýsa, hvør orsøkin er, ella hvat hann heldur orsøkina vera til, at fútin hevur vent sær til Løgmansskrivstovuna um eitt ítøkiligt eftirlitsmál viðvíkjandi eini alifyritøku um revsing fyri brot á djóravælferðarlógina ?

2. Kann løgmaður upplýsa, hvat ítøkliga málið og lógarbrotið snýr seg um ?

3. Kann løgmaður upplýsa, hvørjir myndugleikar sambært lóggávuni á økinum hava heimild at viðgera og taka avgerð í ítøkiliga málinum ?

4. Kann løgmaður upplýsa, hvat løgmaður og fyrisiting hansara ítøkiliga hava gjørt í málinum, og hvat víðari fer fram í málinum?

5. Kann løgmaður upplýsa, hvat landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum og fyrisiting hansara ítøkiliga hava gjørt í málinum, og hvat víðari fer fram í málinum?

6. Metir løgmaður seg kunna røkja eftirlitsskyldu sína sambært stýrisskipanarlógini í hesum máli?

Svar:

Til spurning 1.
Fútin hevur sagt alment í miðlunum, at hann metti at talan var um vitan, sum var viðkomandi fyri løgmann.

Til spurning 2.
Eg kenni ikki annað til málið, enn tað sum hevur verið frammi í miðlunum. Eg má tískil vísa til landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, sum varðar av málsøkinum.

Til spurning 3.

Spurningurin má setast landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, sum varðar av málsøkinum.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Til spurning 4.
Sum tað hevur verið alment frammi í miðlunum, so kunnaði løgmansstjórin meg um kunningina frá fútanum. Eg kunnaði síðani landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum. Meira havi eg ella mín fyrisiting ikki gjørt í málinum.

Til spurning 5.
Spurningurin má setast landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, sum varðar av málsøkinum.

Til spurning 6.
Málið er enn á so innleiðandi stigi, at tað er alt ov tíðliga longu nú at tosa um eftirlit og eftirlitsskyldu.

Í Tinganesi, 10. desember 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður